


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 05 - 2012

## Nógvar milliardir til varandi orku

Amerikanski stórbankin Goldman Sachs ætlar sær at brúka 40 milliardir dollara ella knappar 240 milliardir krónur til íløgur í varandi orkuverkætlanir tey næstu 10 árini. Bankin sigur sambært Reuters, at íløgur í varandi orku hava so góðar møguleikar fyri vinningi, at talan er um eitt av teimum mest áhugaverdu íløguøkjunum, síðani bankin byrjaði at venda eygunum ímóti menningarlondunum fyri meiri enn tíggju árum síðani. Leiðslan í Goldman Sachs kunngjørdi í síðstu viku, at eftirspurningurin eftir alternativum orkukeldum fer at veksa, so hvørt sum eftirspurningurin eftir orku fer at veksa, og at stór framleiðslulond so sum Kina og Brasil hava sett sær størri mál í royndini at skerja dálkingina. Summir ivast Stuart Bernstein, sum stendur á odda fyri teirri deildini hjá Goldman Sachs, sum tekur sær av íløgum í reina tøkni og varandi orku, samanber møguleikarnar við varandi orku við tøkniíløgurnar í 1990-unum ella sum at gera íløgur í teir skjótast veksandi búskapirnar sum Brasil, Russland, India og Kina fyri 10 árum síðani. Málið hjá amerikanska stórbankanum er at gera íløgur fyri 40 milliardir dollarar í eitt nú sól, vind, vatn, biobrenni, orkugoymslu, grønan flutning og LED-ljós. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Goldman Sachs ger íløgur í varandi orku. Í fjør brúkti bankin 4,8 milliardir dollarar til grøna tøkni ymsastaðni kring heimin. Summir eygleiðarar ivast tó í teirri nýggju ætlanini hjá bankanum. Teir halda, at hetta líkist meiri einum sjarmuátaki enn einum veruligum átaki, tí í veruleikanum snýr tað seg bara um fýra milliardir dollarar um árið. Hinvegin fer bankin nógva jaliga umrøðu burtur úr einari lutfalsliga lítlari íløgu, skrivar Reuters.

